# Sáttmáli

millum

## Syðraseyð

og

## Reyn

Eigararnir í hagapørtunum Syðriseyður og Reyn eru komnir ásamt um henda sáttmála í sambandi við, at 8 gl. verða at býta frá úr Syðraseyði til Reyn. Ognin, frábýtast skal, er ogn hjá arvingunum eftir Jensinu Johannesen.

Frábýtið fer fram undir fylgjandi treytum:

§ 1.

At markið verður sett eftir skjali A.

§ 2.

At áseyðatalið, sum býtt verður frá, verður 25. Seyðabýtið fer fram sum ásett í skjali B, pkt. 2.

§ 3.

At Reynshagi ber allar útreiðslur av frábýtinum so sum at flyta stik o.a.m., og at aðrar ognir ella virðir, sum ikki her eru umrødd verða ikki við í frábýtinum.

§ 4.

At stikið verður sett upp aftur eftir ásetingunum í skjali B, pkt.1

§ 5.

At Syðraseyður fær loyvi at leggja el-kaðal gjøgnum vegin frá rættini norður í býtisskápið við nýggja Reynshúsið norðan fyri Kálvadalsá. Vegurin skal gerast aftur í sama stand.

§ 6.

At Reynshagi gevur Syðraseyði treytarleyst grannaloyvi til eina møguliga seinni bygging av húsi á rættina, um bygt verður í mark. Loyvið er ikki tíðaravmarkað.

§ 7.

At Syðraseyður fær loyvi at víðka verandi støðlapláss við rættina við 5 m niðan í brekkuna, og at gera geil/tún fram við rættini umleið 2 m niðan frá henni. Loyvið er ikki tíðaravmarkað.

§ 8.

At Syðriseyður fær loyvi at taka vatn úr Kálvadalsá við leiðing til rættina. Leiðingin verður at leggja í vegin frá rættini tvørtur um brúnna um Kálvadalsá og hagani niðan gjøgnum brekkuna í ein brunn, sum verður settur niður norðanvert fossin í Reiðhjallbrúgv. Og at stoypa vatninntak undir fossinum. Vatnið verður latið ókeypis. Vegur og lendi skal gerast aftur í sama stand. Loyvið er ikki tíðaravmarkað.

§ 9.

At hagapartarnir í felag greiða henda sáttmála mótvegis avvarðandi myndugleikum, soleiðis at frábýtið verður avgreitt uttan kostnað fyri Syðraseyð.

Sandavágur, tann            /            2011.